Ein Suðuroyargrunnur og Sandoyargrunnur verður settur á stovn við kapitali frá komandi
einskiljingini av almennum fyritøkum.

Nú krevst eitt ódnartak til at gera Suðuroy og Sandoy til eitt vakstrar- og royndarøki, um
hesar báðar størru oyggjarnar um 10-15 ár ikki skulu gerast spegilsmyndir av dagsins útoyggjum.

Nú eru Suðuroy og Sandoy skjótt einastu størru øki í Føroyum, sum bert hava sjóvegis samband at líta á. Tí mátti borið til at eyðmerkt hesar báðar størru oyggjarnar sum serskild "vakstrar- og royndarøki".

*(Óli Breckman í fyrispurningi á Løgtingi til Løgmann í august 2005)*

# t fáa pengar á borðið

Suðuroy, so at gongdin við minkandi fólkatali kann vendast og so at oyggin fæst á føtur aftur.

Teir eru sannførdir um, at frægasta leiðin at ganga, er at gera eina vakstraravtalu, har allir partar, politikarar í Løgtingi og kommunum og vinnulívið, binda seg til eina avtalu um at menna ávísar vinnur.

Teir hava sostatt skotið upp, at gjørd verður ein fimm ára vakstraravtalu og at 50 milliónir verða settar av til at seta hana í verk.

Tað liggur í kortunum, at landið skal fíggja 40 milliónir tilsamans í hesum fimm áraavtaluskeiðnum og kommunurnar í Suðuroy skulu leggja 10 milliónir á borðið.

## Høpisleyst

Men Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss eru grundleggjandi ósamdir við teir politikarar, sum halda, at tað fyrireikandi arbeiði skal gerast fyrst og so kunnu politikararnir aftaná taka støðu til tilmælini og til, hvussu tey skulu fíggjast.

Herfyri reisti Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, málið í Løgtinginum, tá ið hann spurdi Jacob Vestergaard, landsstýrismann í innlendismálum, hvussu verður vorðið við nógv umrøddu vakstraravtaluni.

Tá vóru tað enntá politikarar, sum halda, at tað er beinleiðis óseriøst at biðja landskassan um pening, uttan at vita nagreiniliga, hvat hann skal brúkast til.

- Var endamálið einans at gera eina ætlan, er lætt at gera ein langan lista við háfloygdum ynskjum um, hvat skal gerast.

- Men tá ið ein beinleiðis vakstraravtala skal gerast, er neyðugt at vera munandi meiri ítøkilugur og gera realistiskar avtalur, sum hava ein veruligan møguleika at verða settar í verk. Tí er neyðugt at vita, hvussu nógvur peningur er til taks, soleiðis at avtalan verður gjørd innanfyri fíggjarkarmin.

Teir báðir serfrøðingarnir siga, at tað er høpisleyst at gera fastar avtalur við nógvar ymiskar privatar og almennar partar, uttan at vita, hvat endaligi fíggjarkarmurin er.

Tí er neyðugt, at ein yvirskipaður fíggjarkarmur verður lagdur beinanvegin, siga teir.

- Tað er tvørturímóti óseriøst av suðuroyingum at fara til framkomnar, vinnuligar fyritøkur innanlands og uttanlands og biðja tær gera íløgur í ávísar ætlanir, kunnu suðuroyingar ikki eisini sjálvir vísa á, hvussu nógvan pening, teir eru sinnaðir at seta í ætlanin.

- Ongin fyritøka fer at seta pening í eina vinnuliga ætlan, fær hon ikki at vita, hvussu nógv hin parturin er til reiðar at seta í ætlanina.

- Kunnu politikarar ikki frammanundan gera sær greitt, hvussu nógvan pening teir eru sinnaðir at seta í eina vakstraravtalu, er ómøguligt at fáa nakað burturúr.

- Tað er ótrúverdugt at gera avtalur um vinnuligar ætlanir uttan at vita, hvussu nógvir peningur er at gera avtalu við.

## Ein hópur av fordømum

Teir báðir vísa eisini á, at tað finst ein hópur av grunnum, sum hava eitt stovnsfæ, sum teir síðani lata burturav til ávís endamál. Tað er Føroyagrunnurin eitt dømi um.

Fyri at nevna eitt annað dømi, hevur Granskingarráðið eina játtan, sum ráðið síðani letur burturav til ávís endamál.

Tað er ikki kravt frammanundan, at tað skal gerast púra greitt frammanundan, hvat peningurin skal brúkast til.

Í sambandi við eina vakstraravtalu fyri Suðuroy, hugsa Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss sær, at ein grunnur verður stovnaður, sum fær eina reglugerð, sum sigur, hvat peningur kann játtast.

- Hetta er onki nýtt, tí tað finst ein rúgva av grunnum og tað hevur eisini fleiri ferðir verið nevnt, at tað er neyðugt at seta ein Suðuroyargrunn á stovn.

Nú varð nevnt í Løgtinginum stutt síðani, at tað var eitt nýtt krav frá tykkum, at 50 milliónir skuldi setast í grunn, beinanvegin og at hetta var við til at seinka ætanini?

- Tað er ikki rætt, tí tað hevur verið ein heilt greiður partur av hesum arbeiðnum frá allarfyrsta, hetta varð nevnt fyri tveimum árum síðani.



# ur hjá Jacob Vestergaard

num í innlendismálum og avtalan varð, at hann síðani skuldi leggja málið fyri landsstýrið og samgonguna.

## Órímiligt krav

Men síðani er stígur komin í málið, tí nú hevur landsstýrismaðurin ført fram, at tað er neyðugt, at øll bý- og bygdaráðini í Suðuroy samtykkja at betal sín part av teimum 10 milliónunum og boðað landsstýrinum frá hesum.

Jacob Vestergaard hevur ført fram, at tað er neyðugt, at kommunustýrini samtykkja málið, tí borgarstjórarnir kunnu ikki gera eina bindandi avtalu og tað er neyðugt at fáa eina bindandi tilsøgn, áðrenn landsstýrið kann fara víðari við málinum.

Hetta hava allar kommunurnar í Suðuroy síðani gjørt, uttan Tvøroyrar Kommuna.

Tvøroyrar Kommuna skuldi avgreiða spurningin á páskum, men tað er ikki hent. Á býráðsfundi á Tvøroyri í farnu viku, spurdi Jaspur Vang, býráðslimur, eftir málinum og tá upplýsti bogarstjórin, at hetta fór helst at verða lagt fyri býráðið á einum av næstu fundunum.

Teir báðir, Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss, halda, at tað er órímiligt krav at bý- og bygdaráðini skulu samtykkja at fíggja sín part, áðrenn landsstýrið hevur boðað frá sínum vilja.

Teir siga, at var hetta ein treyt, átti landsstýrismaðurin at boða frá tí á fundinum umborð á Smyrli, tá ið viljunarskrivið varð handað honum. Men tað gjørdi hann ikki. Ístaðin fekk hann skrivið við sær til Havnar við tí fyri eyga at hava nakað ítøkiligt at leggja fyri samgonguna.

- Landsstýrismaðurin varð spurdu heilt ítøkiligt, um tað var nóg mikið við hesum viljunarskrivi og tað váttaði hann.

## Tekin um óvilja

Teire báðir siga, at nú hava borgarstjórarnir í Suðuroy váttað sín vilja og tað sama átti landsstýrið at gjørt. Tá ið landsstýrið hevur váttað sín vilja, eiga bý- og bygdaráðini at viðgera málið og samtykkja at staðfesta viljan hjá borgarstjórunum.

- Tá ið borgarstjórarnir skrivað undir eina váttan, eigur tað sjálvandi at verða tikið í størsta álvara, heldur enn at koma aftaná og sáa iva um tað. Sjálvandi er tað rætt, at borgarstjórarnir kunnu ikki einsamallir gera bindandi avtalur fyri kommunurnar. Men landsstýrið kann heldur ikki gera bindandi avtalur og tí hevur landsstýrið heldur ikki bundið seg fyri tað, um tað boðaður frá, hvør landspolitiski viljin er.

- Á sama hátt, sum borgarstjórarnir mugu fáa bý- og bygdaráðini at góðkenna fíggingina, má landsstýrið fáa Løgtingið at samtykkja landsins part av fíggingini.

- Tí eru borgarstjórarnir og landsstýrið í somu støðu. Tá ið borgarstjórarnir hava boðað frá sínum vilja, er tað órímiligt, at at landsstýrið ikki kann gera tað sama.

- Men tá ið landsstýrið ikki ger tað, kann so takast sum eitt tekin um, at landsstýrið als ikki er sinnað at vera við í hesum arbeiðnum at menna Suðuroy.

Hinvegin spyrja teir báðir um tað ikki hevði verið lættari hjá Tvøroyrar Býráði bara at samtykt málið, tí so var friður av hesum og so var hesin snávingarsteinurin minni at fara um.

Nú eru tvey ár síðani, at hugskotið um eina vakstraravtalu varð fostrað, men enn er arbeiðið ongan veg komið.

Og Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss staðfesta, at kemur ikki gongd á arbeiðið sum tað líður út á árið, so at peningur, kann setast av á fíggjarlógini fyri 2008, eru øll sannlíkindi fyri, at teir báðir ikki kunnu vera við í arbeiðnum, tí teir hava aðrar arbeiðsuppgávur

Teir báðir serfrøðingarnir vita ikki reiðiliga, hví tað er so torført hjá politikarum at semjast um at fara undir avtaluna.

Sum tað sæst á einum innrammaðum stubba her á síðunum, tekur Óli Breckman, løgtingsmaður í fólkaflokkinum, og sostatt partarmaður hjá landsstýrismanninum í innlendismálum, undir við, at Suðuroy verður gjørd til eitt serligt vakstrarøki og at ein serligur grunnur verður settur á stovn fyri at menna Suðuroy.

Og samstundis ásannar sjálvur Løgmaður, at Suðuroy hevur ein bygnaðarligan trupulleika.

Harafturat kann nevnast, at eisini Tjóðveldisflokkurin hevur sóknast eftir, hvussu gongur við ætlanini.